Kunngerðablaðið A

2021

Givið út 1. mai 2021

Nr. 48 29. apríl 2021

Kunngerð
um
prógtøkur á gymnasialum miðnámi á sumri 2021

Við heimild í § 1 í løgtingslóg nr. 37 frá 20. apríl 2021 um tillagingar av prógtøkum á gymnasialum miðnámi, orsakað av COVID-19 og í § 19 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar verður ásett:

§ 1. Í løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar verða ásetingarnar í § 1, stk. 8 og § 18, stk. 1 og 2 settar til síðis til 1. oktober 2021.

Stk. 2. Prógtøkur, sum eru skipaðar sambært løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar og kunngerð um prógtøkur í miðnámsútbúgvingunum, verða í 2021 skipaðar sambært skjali 1.

§ 2. Broytingarnar sambært § 1 umfata bert, hvussu nógvar prógtøkur næmingar skulu til. Broytingarnar umfata ikki galdandi reglur um fyrireikingartíð, hjálparmiðlar, prógdøming, prógtøl, kærumøguleikar o.tíl.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn frá útbúgvingarstovni góðkenna frávik frá ásetingunum í hesi kunngerð, tá ið umsóknin er grundað á óvanlig viðurskifti.

§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. oktober 2021.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 29. apríl 2021

Jenis av Rana (sign.)
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

Skjal 1

Yvirlit yvir prótøkur á gymnasialum miðnámi á sumri 2021

Gymnasialt miðnám	**Prótøkur**
3. árs næmingar á hugbreyt, búskaparbreyt og náttúrubreyt	Farið verður til prótøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu prótøkurnar á raðfestingarlistanum hjá einstaka næminginum strikaðar. Ársmet verða flutt til prómet í hesum báðum lærugreinum.
3. árs næmingar á tilfeingisbreyt og tøknibreyt	Farið verður til prótøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu prótøkurnar á raðfestingarlistanum hjá einstaka næminginum, sum ikki eru tøkni og tilfeingi, strikaðar. Ársmet verða flutt til prómet í hesum báðum lærugreinum. Um næmingur bert hevur eina skrivliga prótøku útyvir tøkni og tilfeingi, verður tøkni/tilfeingi strikað og ársmet flutt til prómet.
2. árs næmingar á fyrireinkingarbreyt	Farið verður til prótøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu prótøkurnar á raðfestingarlistanum hjá einstaka næminginum, strikaðar. Ársmet verða givin í staðin fyri prómet í hesum báðum lærugreinum.
1. og 2. árs næmingar á øllum breytum og næmingar, sum taka útbúgvingina yvir fleiri ár, og ikki eru á síðsta ári	Farið verður til prótøku sum vanligt.
Næmingar, sum taka útbúgvingina yvir fleiri ár, og eru á síðsta ári	Farið verður til prótøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu prótøkurnar á raðfestingarlistanum hjá einstaka næminginum strikaðar. Ársmet verða flutt til prómet í hesum báðum lærugreinum. Um næmingur bert hevur eina skrivliga prótøku verður hendan strikað. Ársmet verða flutt til prómet í hesi lærugrein. Um næmingur bert hevur munnligar prótøkur verður farið til prótøku sum vanligt.
Stakgreinalesandi	Farið verður til prótøku sum vanligt.
Sjálvlesandi	Farið verður til prótøku sum vanligt.